MTHøjgaard We know how

J&K PETERSEN

EIÐI 2 Suður KONSORTIET

**Eiði 2 Suður er í gongd við at bora uml. 8,4 km vatntunnil, eisini skulu gerast 27 luft- og vatnskaktir.**

Vit søkja í hesum sambandi eftir einum elektrikara, sum kann luttaka í uppgávuni, og sum kann verða við á boriholdinum.
Tað verður borað í 2-hold skift, við einum holdi á frívakt.

Løn sambært sáttmála + møguleika fyri boribonus.

**Eiði 2 Suður Konsortiet**
Torben Voetmann Johansen
tjo@mthojgaard.dk
Fartlf. 21 63 40

EIÐI 2 Suður KONSORTIET
Hoydalsvegur 42
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 316342




Í samband við at Vodafone fyllir 10 ár,
verður móttøka fríggjadagin 8. apríl
í Skálanum í Norðurlandahúsinum kl. 15.00-17.00.

**Øll eru vælkomin!**
**Vit gleða okkum at síggja tykkum**




# STARVSFÓLK TIL SIRI Í SMS

Í meira enn 25 ár hava vit búleikast í Dr. Jakobsensgøtu í Havn. Har hava góðska og persónlig viðgerð verið okkara merkisorð. Tað verða tey eisini í nýggja handli okkara, sum letur upp í SMS í næstum.

Til SIRI í SMS søkja vit eftir trimum starvsfólkum. Einum dagligum leiðara at arbeiða fulla tíð, og tveimum fólkum at standa í handli umleið hálva tíð.

Vit vænta, at tú hevur áhuga fyri teimum klæðum, sum liggja tætt inn at kroppinum. Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og dugnalig/ur, og hevur hug og evnir at verða ein partur av SIRI-manningini.

Tú verður við til at mynda ein spildurnýggjan handil, sum byggir á herðarnar á væl dámda handlinum í Dr. Jakobsensgøtu. Vit vilja, at nýggja deild okkara í SMS skal varðveita andan í fyritøkuni, men samstundis víðka um sjónarringin.

SIRI í SMS verður við einum ungsintum lyndi, ein handil til tey, sum vilja forkela seg sjálvan ella onnur. Kanska serliga tey ungu og nýtilkomnu, sum eisini vilja hava góðsku og dygd innast inni.

Sendið umsókn við nøkrum orðum um teg sjálva/n við mynd og møguligum upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og viðmælir til:

siri@siri.fo

Kanska hevur tú ikki so nógvar royndir ella nógv pappír, men bert ein brennandi áhuga fyri tí, sum vit fáast við. Og tá skalt tú eisini vera hjartaliga vælkomin at søkja.

**UM SIRI**
SIRI Vælvera er í dag fremsti handil í landinum, tá tað snýr seg um dygdarundirklæði/lingeri í øllum støddum, framkomnar frítíðarskógvar í rætta sniðnum, umframt eina rúgvu av vælveruvørum. SIRI Vælvera hevur eisini hollar royndir í øllum, sum hevur við bróstprotesur at gera. Allir kundar fáa persónliga viðgerð frá okkara serkønu starvsfólkum. Eygleiðing, vegleiðing og ráðgeving eru lyklaorð í okkara gerandisdegi, og við hesum orðum royna vit at nøkta tørvin hjá teimum, sum vilja sær sjálvum og øðrum væl, og sum tora at seta krøv til tað, sum tey vilja hava.

SIRI í SMS verður partur av hesum samtaki og arbeiðslagi, tó at úrvalið í nýggja handli okkara í SMS fer at snara meira kring nútímans ungsint undirklæðir og annað, sum vit brúka inn at kroppinum.

sms